# TILRÁÐING

## um íverksetan av yrkisútbúgving innan fiskireiðskap - serliga trol og nót







www.yrkisdepilin.fo

mai 2004

# Tilráðing

frá fyribilsnevnd, sum Yrkisútbúgvingarráðið
setti í november 2002 til at koma við uppskoti um
yrkisútbúgving innan fiskireiðskap – serliga trol og nót

*Gjørt permu, margfaldað
og innbundið hevur*

YRKIS depilin

Handað Yrkisútbúgvingarráðnum í mai 2004

# Innihald

**1. Partur: Formæli**

**2. Partur: Tilnevning og arbeiðssetningur**

- Áheitanin frá Mentamálaráðnum
- Málið lagt fyri Yrkisútbúgvingarráðið
- Valið av nevndarlimum
- Arbeiðssetningurin

**3. Partur: Arbeiðið hjá fyribilsnevndini**

- Fundarvirksemið
- Greining av arbeiðssetninginum og ávegis niðurstøða
- Tørvurin á útbúgvingini
- Stutt frágreiðing um nóta- og trolfiskiskap og trol- og nótavirksemi á landi
- Fyritøkur, sum gera trol og nótir
- Innihaldið í útbúgvingini
- Verkligi parturin
- Skúlaundirvísingin
- Skúlaskipanin
- Útnorðursamstarv innan útbúgvingina
- Yrkisskeið
- Lærusáttmálaviðurskifti
- Kostnaðarmeting

**4. Partur: Niðurstøða og tilráðing**

# 1. PARTUR

## Formæli

Trol og net eru í dag mest nýttu veiðamboðini hjá føroyskum skipum, soleiðis sum tøl frá grannskoðarafyritøkuni Rasmussen og Weihe, ið vóru kunngjørd í februar 2004, vísa. Sambært hesum yvirliti eru stívliga 900 ársverk umborð á føroyskum trolarum av ymsum slagi og stødd.

Til dagin í dag er sera stór menning farin fram innan økið, svarandi til, at nýggj og broytt skip eru komin: frá fyrstu smáu botntrolunum til nýggj sløg av trolum við støðugt øktari veiðuorku, og sum eru serliga tilevnað til tey ymsu fiskasløgini.

Fyrsti trolarin kom longu í føroyska flotan í 1905, og nakrir komu síðan millum heimsbardagarnar, men tað var serliga aftaná seinna heimsbardaga, at hesin veiðiháttur av álvara fór at taka seg fram millum okkara fiskimenn. Við hesum skipum gjørdist neyðugt við sterkari fíggjarligum grundarlagi enn fyrr, og setti hetta stór krøv til útgerðarmenninar. Íløgurnar gjørdust lutfalsliga stórar og raksturin ofta tungur, tá ið marknaðarviðurskiftini ikki vóru til vildar. Hetta var nakað, sum mangur mátti sanna her á landi í teimum kreppuraktu 1950-árunum.

Fakligi førleikin er eisini mentur so hvørt. Upprunaliga mundi tað vera menn, sum høvdu siglt við enskum trolarum, ið dugdu at veiða við troli, men skjótt tóku aðrir táttin upp og nýttu trolreiðskapin til fulnar. Tá hesir menn løgdust uppi, ella lógu heima millum túrarnar, fingust teir við trolarbeiði á landi. Trolvirki hava verið í Føroyum síðan í krígsárunum, og seinni er “Vónin” í Fuglafirði við deildum í Tórshavn og uttanlands vorðin ein fyritøka, sum stendur mát við aðrar líknandi fyritøkur á heimsmarknaðinum. Fyritøkan framleiðir trol til ymisk fiskasløg, men eisini ringnótir til kraftblokkaveiðu og nótir til alivinnuna. Trolverkstaðurin Bergið í Hvalba, sum er eitt minni virki, ger somuleiðis trol, umframt umvælingar av trolum.

Altjóða marknaðurin verður í alt størri mun merktur av kapping millum stórar fyritøkur, sum menna veiðureiðskap til nýggj og framkomin fiskifør. Skulu føroyingar hava lut í hesum marknaði, verður neyðugt at førleikamenna fólkið umborð eins og á landi, so at vit kunnu nýta mest framkomnu tøknina saman við vitan okkara um, hvussu fiskasløgini ferðast.

Hjá grannum okkara, íslendingum, hevur netagerð verið alment viðurkend vinnugrein síðan 1928, hóast undirvísing ikki varð sett á stovn fyrr enn í 1991. Við miðvíst at menna fólk innan hetta virksemi, hevur eydnast íslendingum at halda yrkið á einum høgum støði, og harumframt at útbúgva netamenn úr øðrum londum.

Tað er tí helst skilagott at finna fram til gongdar leiðir saman við íslendingum, møguliga í einum útnorðursamstarvi, ið eisini fevnir um Grønland. Harafturat átti møguleiki at verið fyri samstarva við onnur grannalond, og harvið geva teimum, ið taka eina yrkis-útbúgving innan trol og nót slíkar førleikar, at tey kunnu hava sítt starvsøki víða um, samstundis sum at vit alla tíðina eru tilvitandi um menningina á altjóða marknaðinum.

Fyribilsnevndin hevur lagt stóra orku í uppgávuna at koma við einari tilráðing um eina útbúgving innan fiskireiðskap við denti á trol- og nótagerð, og er tað hennara vón, at niðurstøðan og tilráðingin hjá nevndini fær ta neyðugu undirtøkuna.

# 2. PARTUR

## Tilnevning og arbeiðssetningur

### Áheitan frá Mentamálaráðnum

Í skrivi frá Mentamálaráðnum, dagfest 17. mars 2003, verður heitt á Yrkisútbúgvingarráðið um at taka útbúgvingina um trol og nót upp til viðgerar.

Í skrivinum sigur Mentamálaráðið m.a., at á tingfundinum tann 16. okt. 2002 fekk landsstýrismaðurin í mentamálum ein munnligan fyrispurning um eina trol- og nótaútbúgving. Í fyrispurninginum verður m.a. sagt, at tað er ynski hjá vinnuni, at møguleiki verður fyri at fáa eina handverkaraútbúgving innan trol- og nót. Útbúgvingin kundi verði tilrættisløgd sum aðrar yrkisútbúgvingar. Lærutíðin kundi hóskandi verið á trolarum, nótabátum og trolvirkjum, soleiðis at teir læra at handfara fiskireiðskap, trol og nótir, meskar, bøta og skera trol, gera nótir og trol v.m.

At enda í skrivinum verður sagt soleiðis: ”Mentamálaráðið fer tí sambært § 21, stk. 2, nr. 7 í yrkisútbútbúgvingarlógini at leggja spurningin fyri Yrkisútbúgvingarráðið. Um Yrkisútbúgvingarráðið kemur við einum tilmæli um at seta eina trol- og nótamannaútbúgving á stovn, fer Mentmálaráðið væntandi at viðgera málið við vælvild sambært tí, sum kom fram á tingfundinum 16. oktober 2002.”

### Málið lagt fyri Yrkisútbúgvingarráðið

Uppskotið varð lagt fyri Yrkisútbúgvingarráðið á ráðsfundi tann 27. nov. 2002 – mál nr. 5-2002/2003, *uppskot um trol- og nótamannaútbúgving*.

Í gerðabókini fyri nevnda ráðsfund stendur soleiðis:

“Umrøtt varð, hvørt útbúgvingin skuldi fevna um annan reiðskap enn trol og nótir. Nevnt varð, at útbúgvingin eisini átti at fevnt um t.d. línu. Skotið varð upp, at útbúgvingin kundi havt heitið: yrkisútbúgving innan fiskireiðskap. Eingin avgerð varð tikin um heitið“.

Ráðið samtykti, at sett verður ein fyribilsnevnd, sum skal viðgera málið og koma við einum áliti um útbúgvingina.

## Val av nevndarlimum

Ráðsfyrisitingin sendi í skrivi dagfest 11. des. 2002 áheitan á Fiskimannafelagið, Reiðarafelagið, Pf. Vónina og Mentamálaráðið um at velja ein lim fyribilsnevndina, og vóru hesir limir valdir:

Jógvan P. Olsen vegna Føroya Fiskimannafelag
Jógvan Norðbúð vegna Føroya Reiðarafelag
Hjalmar Petersen vegna Pf. Vónina
Hans Andr. Dam Joensen vegna Mentamálaráðið
Petur Oluf Hansen, skrivari í nevndini

## Arbeiðssetningur

Í innkallingini til 1. fundin í fyribilsnevndini, hevur ráðsfyrisitingin tilevnað eina leiðbeining í sambandi við arbeiðið hjá fyribilsnevndini, har m.a. sagt verður soleiðis:

Sambært § 22, stk. 3 í yrkisútbúgvingarlógini er ásett, at *tá ið útbúgvingar skulu fyrireikast og setast í verk, kann yrkisútbúgvingarráðið seta fyribilsnevndir*. Uppgávan hjá fyribilsnevndini er í høvuðsheitum at koma við tilráðing til ráðið um ymisk viðurskifti i sambandi við eina *nýggja* yrkisútbúgving. Tilráðingin hjá fyribilsnevndini verður viðgjørd á ráðsfundi, har fundurin við støði í henni tekur avgerð um, hvørt ráðið skal mæla landsstýrismanninum til at seta útbúgvingina á stovn.

Yrkisútbúgvingarlógin ásetir m.a., at ein yrkisútbúgving skal
1) nøkta tørvin hjá vinnuni, tá ið um ræður fakligan førleika og almennan kunnleika,
2) leggja grundarlag undir framtíðar yrki og framhaldandi útbúgving,
3) verða skipað sum ein skiftivís verklig upplæring á læruplássi og undirvísing í skúla, og
4) verða grundað á lærusáttmála samsvarandi galdandi ásetingum.

Samsvarandi nevndu meginreglum, eigur fyribilsnevndin
1) at geva ráðnum sína meting um tørvin á slíkari útbúgving,
2) at meta um fyritreytirnar fyri læruplássum innan hetta øki eru til staðar,
3) at meta um fyritreytirnar fyri neyðuga fakliga og almennandi undirvísing eru til staðar, og
4) at gera eina tilráðing um, hvussu ein møgulig útbúgving í høvuðsheitum eigur at verða skipað, her í millum við atliti at innihaldinum, býtið millum verkliga partin og skúlapartin o.s.fr.

> *"... tað er ynski hjá vinnuni, at møguleiki verður fyri at fáa eina handverkaraútbúgving innan trol- og nót. Útbúgvingin kundi verði tilrættaløgd sum aðrar yrkisútbúgvingar. Læru-tíðin kundi hóskandi verið á trolarum, nótabátum og trolvirkjum, soleiðis at teir læra at handfara fiskireiðskap, trol og nótir, meskar, bøta og skera trol, gera nótir og trol v.m."*
>
> Brot úr skrivi frá Mentamálaráðnum

# 3. PARTUR

## Arbeiðið hjá fyribilsnevndini

### Fundarvirksemið

Nevndin hevur havt 12 fundir. Fyrsti fundurin varð hildin 25. juni 2003 og tann seinasti 4. mai 2004.

Samanumtikið kann sigast, at arbeiðið hjá nevndini hevur gingið væl, og eru limirnir í nevndini samdir um niðurstøðurnar og tilmælini í hesi tilráðing.

Nevndin hevur vitjað Pf. Vónina í Havn og í Fuglafirði.

Trolverkstaðurin Pf. Bergið í Hvalba hevur ávegis verið kunnaður um arbeiðið í nevndini.

Eisini hevur formaður Fiskimannafelagsins luttikið á fundi, tá tilnevnda umboðið hevur verið til skips.

*Samanumtikið kann sigast, at arbeiðið hjá nevndini hevur gingið væl, og eru limirnir í nevndini samdir um niðurstøðurnar og tilmælini í hesi tilráðing.*

### Greining av arbeiðssetninginum og ávegis niðurstøða

Fyribilsnevndin skilir skrivið frá Mentamálaráðnum til Yrkisútbúgvingarráðið í sambandi við setan av fyribilsnevndini soleiðis, at talan er um at gera eina útbúgving innan fiskireiðsskap, serliga innan trol og nót, ið er skipað eins og aðrar yrkisútbúgvingar.

**Við nevndu fatan er fyribilsnevndin komin til hesa ávegis niðurstøðu:**
**Skilabesti hátturin at røkka hesum endamáli er,**

- **at sett verður á stovn útbúgving innan fiskireiðskap við serligum denti á trol- og nótareiðskapi,**
- **at útbúgvingin varir 3 ár og 3 mánaðir og verður skipað á sama hátt sum aðrar yrkisútbúgvingar,**
- **at verkligi parturin fer fram á trol- og nótavirki og umborð á skipi,**
- **at í 1. árinum í útbúgvingini er skúlagongdin eitt heilt støðisár og í øðrum og triðja læruárinum tilsamans 12 vikur.**

## Tørvurin á útbúgvingini

Sum nevnt í formælinum, er fram til dagin í dag sera stór menning farin fram innan økið, svarandi til, at nýggj og broytt skip eru komin: frá fyrstu smáu botntrolunum til nýggj sløg av trolum við støðugt øktari veiðuorku, og sum eru serliga gjørd til tey ymsu fiskasløgini.

Tað var tí serlig orsøk til, at farið varð undir trol- og nótagerð, tá ið trolfiskiskapurin av álvara tók seg upp eftir seinna heimsbardaga og nótafiskiskapurin seinni tók seg upp. Hetta virksemi er økt alt síðani tá, umframt at framleiðslan verður útflutt til mong onnur lond.

Sum nevnt vóru tað upprunaliga menn, sum høvdu siglt við enskum trolarum, ið dugdu at veiða við troli, men skjótt tóku aðrir táttin upp og nýttu trolreiðskapin til fulnar. Tá hesir menn løgdust uppi, ella lógu heima millum túrarnar, fingust teir við trolarbeiði á landi.

Nevndin er samd um týdningin av, at fólk í okkara høvuðsvinnu fáa útbúgving á jøvnum føti við aðrar vinnuvegir. Skal virksemið innan trolvinnuna framhaldandi mennast, er nevndin samd um, at neyðugt er við einari miðvísari útbúgving, so at eisini ungdómurin í dag kann føra hesa vitan og henda førleika víðari.

*Hetta er positivt fyri skipini, sum eru tryggjað manning við hesum serkunnleika, og tað er positivt fyri fiskimenn, sum kunnu tryggjast pappír uppá sín førleika".*

Brot úr úttalilsi frá Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag

Í skrivi, sum fyribilsnevndin hevur móttikið frá Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag, siga feløgini seg taka undir við, at farið verður undir eina útbúgving innan fiskireiðskap. Skrivið frá feløgunum er soljóðandi:

*"Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag ásanna, at tað er tørvur á eini skipaðari upplæring innan reiðskap á fiskiskipum.*

*Hetta verður gjørt út frá teirri ásannan, at umstøðurnar á hesum økinum eru broyttar. Fyrr var tað soleiðis, at ein upplæring á hesum og øðrum økjum var ein náttúrligur partur av mannagongdini umborð á einum skipi. Hetta er kanska ikki longur eins náttúrligt.*

*Nú skulu menn helst duga sítt arbeiði longu tá teir koma við einum skipi. Tí er tað sera positivt, at vit nú kunnu fáa eina upplæring á hesum øki. Hetta er positivt fyri skipini, sum eru tryggjað manning við hesum serkunnleika, og tað er positivt fyri fiskimenn, sum kunnu tryggjast pappír uppá sín førleika".*

Eisini hevur trolverkstaðið Spf. Bergið í Hvalba í skrivi boðað soleiðis frá:

*"Vit hava gjøgnumgingið tilfarið grundiga, og kunnu vit taka undur við øllum tí, sum nevndin hevur arbeitt við, sum viðvíkur nóta/trolskúlanum, sum ætlanin er at seta á stovn".*

## Stutt frágreiðing um nóta– og trolfiskiskap og trol– og nótavirksemi á landi

*Partrolarnir* undir Føroyum fiska eftir upsa, toski, hýsu og øðrum fiskasløgum uttanfyri 12 fjórðinga markið alt árið. *Trolbátar* fiska eftir somu fiskasløgum, men hava eisini loyvi at fiska innanfyri 6 fjórðinga markið.

*Rækjutrolarar*, sum tíverri ikki hava tað so gott í hesum árum, fiska fyri tað mesta við Flemish Cap, men hava eisini kvotu í Eystur Grønlandi og við Svalbard.

*Pelagisku skipini* fiska bæði við flótitroli og nót, men nógv mest við flótitroli. Fiskasløgini teir fiska eru: svartkjaftur, makrelur, sild og lodna. Lodnan verður fiskað við nót við Eysturlandið í Íslandi. Loyvt er einans at fiska 30.000 tons, so tað tekur ikki meir enn ein mánaða, so er tað fiskað. Áðrenn lodnufiskiskapurin tekur seg upp við Ísland, royna bátarnir eftir svartkjafti vestan fyri Írland. Tá lodnukvotan er uppfiskað, fara teir aftur eftir svartkjafti. Sild og makrelur verður mest fiskað í norskum sjógvi, bæði við troli og nót, serliga um heystið. Samanumtikið má sigast, at tað verður nógv mest roynt eftir svartkjafti, tað vil siga við troli.

*Djúpvatnstrolarnir*, sum eru teir, ið fiska eftir kongafiski og upsa, fiska eisini alt árið og hava higartil fyri tað mesta landa í Suðuroynni. Tað er hesar bátarnar, trolvirkið Bergið í Hvalba selur mest til.

*Flakatrolarnir* royna fyri tað mesta í Barentshavinum eftir toski og hýsu. Roynt verður eisini nakað við Vestur Grønland eftir svartkalva á djúpum vatni. Ein part av árinum verður fiskað í Irmingarhavinum eftir kongafiska við flótitroli.

## Fyritøkur, sum gera trol og nótir

Tað eru einans tvær fyritøkur her á landi, sum gera trol og nótir. Hesi eru trolvirkið Pf. Vónin í Tórshavn og Fuglafirði og trolverksstaðurin Pf. Bergið í Hvalba. Eisini eru fyritøkurnar Garnavirkið á Oyri, sum umvælir alinótir, og Netamontering á Oyrabakka, sum ger gørn.

***Trol- og nótavirkið VÓNIN*** byrjaði sítt virksemi í 1971 í Fuglafirði. Teir somu fimm menninir, sum keyptu trolaran VÓNIN í 1969, tóku stig til hetta virkið, sum í dag er eitt av teimum størstu virkjunum av sínum slag á okkara leiðum.

Í Fuglafirði, har høvuðssætið er, verður reiðskapur til uppisjóvarfisk og aliútgerð framleiddur og umvældur, meðan alt, ið hevur við botntrol at gera, er á virkinum í Tórshavn. VÓNIN hevur eisini virki í Nuuk í Grønlandi og í Port De Grave í New Foundlandi. Tað eru sostatt góðir møguleikar at veita skipum eina góða tænastu, sum fiska í Norðuratlantshøvum.

Størstu kappingarneytarnir eru Hampiðjan og Isfell í Íslandi, Egersund Trawl, Selstad og Mørenot í Noreg, Cosmos Trawl í Danmark og Bergið í Hvalba. Allir hesir eru eisini veitarar til skip, ið fiska á somu høvum, har VÓNIN hevur sítt kundagrundarlag ella arbeiðsøki.

Pf. Vónin er eitt framkomið virki, sum verður mett ikki at standa aftanfyri nakran av hesum kappingarneytum. Samstarvið við keypararnar av framleiðsluni og gott starvsfólk á virkinum, hevur saman við øðrum sera stóran týdning fyri virkið og ger, at tað stendur seg væl í kappingini. Uml. 80 starvast á virkinum, harav 10 uttanlands.

***Trolvirkið Bergið í Hvalba*** varð stovnað í 1984 av teimum, sum áttu trolarnar Steintór og Niels Paula. Síðani Bergið byrjaði virksemi sítt, er fyritøkan vaksin so mikið, at hon í dag útger allar bátarnar í Suðuroynni og stórt sæð allar djúpvatnstrolararnar í Føroyum. Virkið kann harumframt framleiða allan fiskireiðskap.

Fyritøkan ognaði sær ein eldri bygning fyri 15 árum síðani, har trolreiðskapur verður gjørdur, umframt at annað virksemi fer fram har í hesum sambandi. Á Berginum starvast 7 fólk, íroknað skrivstovufólk.

Við tí virksemi, sum Bergið hevur havt tey seinastu árini, metir fyritøkan seg kunna taka lut í upplæringini av komandi lærlingum innan trolgerð.

## Innihaldið í útbúgvingini

### Verkligi parturin

Upplæringin fer fram bæði á landi og umborð á skipi. Mælt verður til, at upplæringin á landi telur uml. tríggjar fjórðingar og upplæringin umborð á skipi uml. ein fjórðing. Samlaða tíðin í verkliga partinum er 118 vikur (3 ár og 3 mánaðir (tils. 170 vikur) minus 52 skúlavikur).

Læruplássið ger sbrt. § 28 í lógini um "útisetavirki" avtalu við *onnur virki* og *onnur skip* í teimum verkligu pørtunum, sum ikki kunnu takast á læruplássinum. Upplæringin innan tey ymsu arbeiðsøkini verður váttað í eini loggbók, sum læruplássið hevur skyldu at føra. Hugsast kann, at ein partur av upplæringini kann fara fram í deildum uttanlands, sum t.d. Pf. Vónin hevur í Kanada og Grønlandi, umframt at fáa upplæring í t.d. Íslandi ella í øðrum landi.

Verkliga læran kann t.d. fara fram soleiðis:

| ***Lærupláss*** | ***Tíð (vikur uml.)*** |
|---|---|
| Á trol- og nótavirki | 94 |
| Við rækjutrolara | 12 |
| Við flakatrolara | 8 |
| Við nótabáti | 4 |
| *Tilsamans* | *118* |

***Upplæringin á virkjum á landi***

Á læruplássinum skal lærlingurin fara ígjøgnum og arbeiða við øllum teimum viðkomandi arbeiðsuppgávunum, sum eru á virkinum. Hesar verða nærri lýstar í fylgisskjali til útbúgvingarkunngerðina.

Innihaldið í verkliga partinum:
- at gera upp nálir
- bendsla og seyma
- reinsa knútar
- gera uppmátingar av ketu, togi og manila
- seta línur við
- montera fiski- og høvuðlínu
- seta kúlur á trol
- skera niður eftir tekning
- finna tilfar eftir einari tekning
- læra at lesa tekningar
- mála og gera breitlar
- spleysa
- vera eitt skifti á goymsluni
- vera við í arbeiðnum at gera rækju- toska- og flótitrol

***Upplæringin umborð á skipum***

Arbeiðið umborð umfatar viðlíkahald, sum ber í sær alt tað, sum lærlingur fær í síni upplæring á virkjunum. Lærlingurin kemur umborð á skipunum at síggja reiðskapin í nýtslu, tað vil siga: seta út ella kasta og taka innaftur sum fastur maður á dekkinum, og skal sjálvsagt eisini vera við í framleiðsluni, tá ið onki arbeiði er á dekkinum. Næmingurin kemur at læra alt um, hvussu trolið verður gjørt fiskiklárt, sum tað oftast verður gjørt fyrst á túrinum og eisini, hvussu tað verður viðlikahildið á túrinum. Hetta ber í sær, at grunnurin verður máldur upp, síðani verður fiskilínan máld upp og til seinast verða fiskilína og grunnur sett saman sum tey skulu standa, hettar er nakað ið vanliga verður gjørt fleiri ferðir á einum langfaratúri. Trolveirurin verður spleysaður og lemmarnir skulu røkjast, tað vil siga at skógvarnir verða skiftir alt eftir tørvi.

Skipið skal eisini røkjast og tað verður vaskað bæði innan og uttan. Annars skal lærlingurin vera við í øllum vanligum skipsarbeiði og eisini ganga brúgvatørn, tá ið tað passar soleiðis. Best var, um lærlingurin eftir lokna útbúgving hevur møguleika at fara beinleiðis á sjómansskúla, um hugurin er til tað.

## Skúlaundirvísingin

Sambært yrkisútbúgvingarlógini fevnir undirvísingin í skúlanum um **yrkislærugreinir**, **almennar lærugreinir** og **vallærugreinir**. Yrkislærugreinir skulu vanliga hava seks tíggjundapartar av samlaðu tíðini, almennar lærugreinir tríggjar tíggjundapartar og vallærugreinir ein tíggjundapart.

Um vit hugsa okkum, at talan verður um eina **3 ár og 3 mánaðar útbúgving** við einari skúlagongd upp á 52 vikur (40 + 12) á 35 t/v, verða samlaðu skúlatímarnir 1820 tímar, harav

1. yrkislærugreinir 60% ella 1092 tímar
2. almennar lærugreinir 30% ella 546 tímar
3. vallærugreinir 10% ella 182 tímar

<u>Yvirskipað ásetir lógin, at:</u>

*yrkislærugreinirnar* fata um verkliga og ástøðiliga undirvísing, ið sermerkja viðkomandi útbúgving og skulu veita almennan kunnleika og fakligan yrkisførleika. Partur av yrkislærugreinunum eru *serlærugreinir*, ið eru á hægsta fakliga stigið í útbúgvingini og fata um verkliga og ástøðiliga undirvísing, ið skal miða ímóti at veita lærlinginum ein serligan yrkisførleika. Lærlingurin velur *sergrein* innan ta útbúgving, hann hevur gjørt lærusáttmála í.

*almennu lærugreinirnar* fevna um ástøðiliga undirvísing, ið skal miða ímóti at menna tann almenna kunnleikan. Somuleiðis skulu almennu lærugreinirnar nøkta krøvini til ungdómsútbúgvingar, her í millum styrkja persónliga menning, lestrarførleika og samfelagsfatan.
*vallærugreinirnar* skulu miða ímóti at nøkta áhugamál lærlingsins, at stuðla áhugan fyri framhaldandi útbúgving og menna yrkis- og lestrarførleikan. Vallærugreinirnar skulu eisini stimbra vanligu førleikakrøvini og arbeiðsmøguleikarnar í samfelagnum.
Yrkislærugreinirnar kunnu t.d. verða hesar:

| *Lærugrein* | *Vegleiðandi tímatal* |
|---|---|
| Fiskasløg og fiskileiðir | 35 |
| Fyriskipan (leiðsla og umsiting) | 35 |
| Góðskustýring | 35 |
| Heilsa, trygd og umhvørvi | 35 |
| KT | 70 |
| Smáverulívfrøði | 35 |
| Lógir og reglur um reiðskap | 35 |
| Onnur útgerð og aðrir veiðuhættir | 35 |
| Virkisfrágreiðing | 70 |
| Menning av netareiðskapi | 70 |
| Netagerð og trolútgerð | 385 |
| Tekning | 210 |
| Sveinaroynd | 35 |
| *Tilsamans* | *1085* |

Almennu lærugreinirnar kunnu t.d. verða hesar:

| *Lærugrein* | *Tímatal* |
|---|---|
| Enskt | 140 |
| Føroyskt | 140 |
| Samfelagsfrøði | 105 |
| Støddfrøði | 140 |
| *Tilsamans* | *525* |

Vallærugreinirnar kunnu t.d. verða hesar:

| *Lærugrein* | *Vegleiðandi Tímatal* |
|---|---|
| Vinnulæra | 35 |
| Ítróttur/ítriv | 35 |
| KT 2 | 70 |
| Vistfrøði | 35 |
| *Tilsamans* | *175* |

## Skúlaskipanin

Fyribilsnevndin mælir til, at skúlagongdin í støðisárinum fer fram á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna.

Undirvísingin í fyrru helvt í støðisárinum, t.v.s. fram til jóla (heysthálvan), er øll á skúlanum, meðan lærlingurin í seinnu helvt av støðisárinum (várhálvuni) fær verkliga upplæring á læruplássinum í yrkislærugreinum í uml. 2 dagar um vikuna.

Í øðrum og triðja árinum verður mælt til, at skúlagongdin partvís fer fram á ávikavist læruplássinum, á Fiskivinnuskúlanum og í samstarvi við Útnorður, t.v.s. við skúla í Íslandi. Talan kann t.d. verða um at fáa lærarar og yrkiskøn úr Íslandi til Føroya at undirvísa part av tíðini, at kanna møguleikan fyri fjarlestri og møguleikan hjá lærlingunum at fara á lestrarvitjan í Útnorði.

Skal skúlagongdin samskipast við aðrar útbúgvingar á Fiskivinnuskúlanum, er neyðugt, at lærlingar gera lærusáttmála eina ávísa tíð í árinum.

Av tí at upptøkan til støðisárið fer fram í seinasta lagi 15. mars, er neyðugt hjá teimum lærlingum, sum skulu taka støðisárið, eisini at verða tiknir upp somu tíð. Hetta merkir, at læruplássið áðrenn 15. mars skal taka støðu til, um tað vil taka lærling í læru. Lærusáttmáli skal gerast í seinasta lagi 3 mánaðir áðrenn skúlagongdin í støðisárinum byrjar. Hetta kemst av, at fyrstu 3 mánaðirnar er royndartíð, har partarnir einsíðis kunnu siga upp lærusáttmálan.

*Tíðargongdin í lærutíðini:*

| Tilmelding til skúla-gongd í støðis-árinum | Læru-sáttmáli undir-skrivast | Støðis-árið byrjar | Støðis-árið endar | Verklig upp-læring | Skúla-skeið eftir støðis-árið | Sveina-roynd |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. mars | Í seinasta lagi 1. mai | Um miðjan august | Seinast í juni | Eftir summar-frítíðina | Tils. 12 vikur í 2. og 3. árinum | |

## Útnorðursamstarv innan útbúgvingina

Í sambandi við ætlaðu yrkisútbúgvingina innan trol og nót hevur Mentamálaráðið samskift við Fjölbrautaskóla Suðurnesja, sum liggur í Keflavík. Hesin skúli er einasti skúli um okkara leiðir, ið bjóðar eina tílíka útbúgving fram. Í einum brævi bjóðaði skúlin sær longu í 2001 at samstarva við føroyingar og grønlendingar um útbúgvingina. Harafturat eru góðir møguleikar fyri samstarvi við onnur lond í útbúgvingini, eitt nú fær skúlin næmingar gjøgnum United Nations' School of Fisheries. Fjölbrautaskóli Suðurnesja er ein rættiliga stórur skúli við tilsamans 750 næmingum í dagskúla og umleið 300 næmingum í kvøldskúla. Einir 55 lærarar undirvísa á skúlanum. Útbúgvingarbygnaðurin er skipaður soleiðis, at tað er lætt at samskipa ymsar útbúgvingar innan ein felags karm. Einstøku lærugreinirnar eru *sjálvstøðugar eindir*, ið verða settar saman til ymiskar útbúgvingar.

Netamannaútbúgvingin er farin fram á skúlanum síðan 1991 og eftir hvat ið skilst, verður hon støðugt ment og lagað til tørvin hjá vinnuni. Í 1999 tilnevndi íslendska Mentamálaráðið skúlan til royndar- og menningardepil innan veiðuútgerð og útbúgving.

Útbúgvingartilboðið í Íslandi er sett saman av almennum lærugreinum og yrkislærugreinum. Í okkara høpi hava yrkislærugreinirnar serligan áhuga, tí tað er innan hesar lærugreinir, at okkara avmarkingar eru í Føroyum. Ein gongd leið hevði í hvussu so er verið at samstarva um ávísar yrkislærugreinir, møguliga partvís við fjarlestri, sum dagsins framkomna kunningartøkni jú hevur lagt eitt gott støði undir.

Hugsað verður serliga um lærugreinirnar *netagerð* og *tekning*. Hesar lærugreinir kunnu skipast sum samstarv millum skúlan og læruplássið, møguliga á tann hátt, at lærlingar kunnu fáa undirvísing á skúlanum í styttri tíðarskeið, og annars við fjarnámi. Eftir hvat skilst í samrøðum við skúlastjóran, ber óivað til at finna eina loysn, sum hóskar til okkara tørv.

*Í sambandi við ætlaðu yrkisútbúgvingina innan trol og nót hevur Mentamálaráðið samskift við Fjölbrautaskóla Suðurnesja, sum liggur í Keflavík. Hesin skúli er einasti skúli um okkara leiðir, ið bjóðar eina tílíka útbúgving fram. Í einum brævi bjóðaði skúlin sær longu í 2001 at samstarva við føroyingar og grønlendingar um útbúgvingina. Harafturat eru góðir møguleikar fyri samstarvi við onnur lond í útbúgvingini, eitt nú fær skúlin næmingar gjøgnum United Nations' School of Fisheries.*

## Yrkisskeið

Afturat yrkisútbúgvingini, ið arbeiðsbólkurin mælir til, hevur vinnan møguleikar fyri at skipa fyri sonevndum yrkisskeiðum (arbeiðsmarknaðar- og eftirútbúgvingum) innan ávís arbeiðs- og áhugaøki hjá starvsfólkunum. Hugsað verður serliga um tey, sum frammanundan hava drúgvar arbeiðsroyndir, men sum vanta kunnleika innan ávís evni.

Tað hevði eitt nú verið eitt gott ískoyti hjá hesum starvsfólkum, at tey kunnu taka skeið innan serlig fakøki og innan ymiskt nýtt, ið kemur fram innan handverkið. Ávísa yrkisnevndin skal góðkenna innihaldið í slíkum skeiðum og í størst møguligan mun tryggja, at tað hongur saman við lærugreinunum í yrkisútbúgvingini.

Á henda hátt er ómakaleyst at góðskriva tey sum part av yrkisútbúgvingini, um onkur seinni fær hug at taka hana. Tað átti at verið ein felags søk hjá virkisleiðslu og hjá starvsfólki at ment førleikarnar á arbeiðsplássinum, so hvørt sum áneyðir eru fyri tí. Væntast kann, at menningin av fiskireiðskapi fer at standa við komandi árini, og dugnalig starvsfólk er ein av fortreytunum fyri henni. Við yrkisskeiðunum ber til at lyfta førleikastøðið hjá øllum starvsfólkum í fyritøkuni so hvørt sum tørvur er á tí innan ávís øki. Talan kann eitt nú vera um skeið, ið snúgva seg um:

- Arbeiðsstøður og ergonomi
- Fyrstuhjálp
- Haldbæri við ymiskum reiðskapi
- Lógir og reglur
- Netagerð
- Reiðskapur og umhvørvi
- Tekning
- Tilfarslæru
- Tilgerð og viðlíkahald av reiðskapi
- Tilvitan/stýring av arbeiðsumhvørvi
- Trivnaður á arbeiðsplássinum
- Umhvørvistilvit og –hugburður

*Væntast kann, at menningin av fiskireiðskapi fer at standa við komandi árini, og dugnalig starvsfólk er ein av fortreytunum fyri henni. Við yrkisskeiðunum ber til at lyfta førleikastøðið upp hjá øllum starvsfólkum í fyritøkuni so hvørt sum tørvur er á tí innan ávís øki.*

## Lærusáttmálaviðurskifti

Skal talan verða um eina yrkisútbúgving er meginreglan tann, at lærusáttmáli verður stovnaður millum lærling og eitt ella fleiri virki. At hava ein lærusáttmála ger, at viðkomandi fær ta neyðugu upplæringina í tí verkliga partinum.

Lærlingar fáa løn í lærutíðini sambært lønarsáttmála við avvarðandi yrkisfeløg. Læruplássið fær part av útgoldnu lønini (sum í mai 2004 er 75%) endurgoldnað úr landskassanum, tó í mesta lagi av ásettu minstulønini  fyri lærlingar.

Viðvíkjandi tí partinum av verkligi læruni, sum fer fram umborð á skipi, verður mælt til, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum gera eina serliga avtalu um lønina.

## Kostnaðarmeting

Tá talan er um eina yrkisútbúgving, fáa læruplássini sambært galdandi áseting í lærlingalógini løn, meðan lærlingar eru í skúla, endurgoldna.

Tað verður neyvan eitt stórt tal lærlingum, sum fer undir hesa útbúgving – einir fýra ella fimm um árið - og við tað at skúlagongdin fyri ein stóran part verður samskipað við støðisárið, t.v.s., at hesir koma at ganga í sama flokki sum hinir støðisnæmingarnir, so fer hetta ikki at hava týðandi útreiðslur við sær fyri landskassan. Sambært upplýsingum frá viðkomandi virkjum, er ikki neyðugt at gera íløgur til útbúnað, tól ella annað í sambandi við upplæringina, og fer útbúgvingin á læruplássunum tískil ikki at hava stórvegis útreiðslur fyri landskassan.

# 4. PARTUR

## Niðurstøða og tilráðing

### Niðurstøða

Fyribilsevndin mælir til, at sett verður á stovn yrkisútbúgving innan fiskireiðskap við serligum denti á nóta- og trolreiðskap.

### Tilráðing

Fyribilsnevndin er av teirri meting, at hon í hesi tilráðing hevur lýst tey viðurskifti, sum henni varð álagt í tilnevningarskrivinum.

Mett verður, at skipanin, soleiðis sum hon er lýst í hesi tilráðing, lýkur tey krøv, sum sett eiga at verða slíkari útbúgvingarskipan. Mett verður eisini, at skipanin er soleiðis, at til ber at samstarva um landamørk.

Tórshavn í mai mánaði 2004

| | |
|---|---|
| Hjalmar Petersen | f/ Jógvan P. Olsen<br>Óli Jacobsen |
| Jógvan Norðbúð | Hans Andr. Dam Joensen |
| | *Petur Oluf Hansen,*<br>*skrivari* |